# Øskudólgur og sópingarkona

1.Øskudólgur og sópingarkona
hildu sær at gaman,
hvussu skulu vit liva,
tá ið vit koma saman ?

*Veturin líður, summarið kemur,*
*jørðin gerst so blíða,*
*tað grør so fagurt aldin undir líða*

2.Vit skulu taka tráðu í hánd,
ganga oman við á,
fiska okkum smásíl
og føða okkum svá.

3.Hvussu skulu vit liva,
tá ið síl eru eingi í á ?
Vit skulu okkum í havið út
stóran fisk at fá.

4.Hvussu skulu vit liva,
tá ið fiskurin vil ikki bíta ?
Vit skulu okkum í bóndans garð
at treskja kornið hvíta.

5.Hvussu skulu vit liva,
tá ið bóndin eigur einki korn ?
Vit skulu taka lúður í hánd
og blása hart í horn.

6.Hvussu skulu vit liva,
tá ið hornið vil ikki láta ?
Vit skulu taka hamar og tong
og smíða skip og bátar.

7.Hvussu skulu vit liva,
tá ið báturin vil ikki ganga ?
Far tær aftur í dungan út,
eg vil ikki við teg pranga!

This document was created with Win2PDF available at http://www.win2pdf.com.
The unregistered version of Win2PDF is for evaluation or non-commercial use only.
This page will not be added after purchasing Win2PDF.